## DAGSINS MEINING

# Eitt gott samfelag

Í ólavsøkurøðu síni kom løgmaður inn á spurningin um at varðveita og menna vælferðarsamfelagið. Hann tosaði um at leggja tey menniskjansligu virðini í politikkin, so at politikkurin alla tíðina hevur sum mál at skapa eitt betri og eitt tryggari samfelag - lata politikkin stutt og greitt snúgva seg um menniskjuni. Løgmaður talaði um tað góða samfelagi, sum vit skulu byggja í felag, sum hann tók til við einum vælkendum Palmesitati.

Ítøkiliga merkir hetta, at landsstýrið hevur sett sær fyri at betra um umstøðurnar hjá okkara eldru. Tilboðini til teirra skulu samsvara við tørvin hjá tí einstaka. Tørvurin á røktarheimsplássum er stórur, og í samstarvi við kommunurnar verður arbeitt við at útvega fleiri pláss. Arbeitt verður eisini við at gera eina føroyska forsorgarlóg, sum skal koma í staðin fyri galdandi donsku lógina frá sekstiárunum. Forsorgarlógin skipar grundleggjandi viðurskifti millum einstaklingin og tað almenna. Løgmaður vísti á hetta, at vit fyri fyrstu ferð fara at umrøða, hvat vit í Føroyum halda, at skyldurnar hjá tí almenna eru fyri einstaklingin, og skyldurnar hjá einstaklinginum eru fyri tí almenna. Forsorgarlógin fer við hesum at vera grundað á okkara egna samfelag. Arbeiðið er sera víðfevnt og er tí skipað í stigum. Tað verður eftir ætlan liðugt um trý ár.

Samgongan ætlar eisini at loysa eftirlønarmálið. Avgjørt er at styrkja samhaldsfasta við at hækka inngjaldið upp í 1,5 %. Við hesum verða betri fyritreytir fyri at røkka einum góðum úrsliti við eini pensjónsskipan, ið byggir á tríggjar súlur, ávikavist fólkapensjón, samhaldsfasta og eina eftirlønaruppsparing. Við fólkapensjónini og samhaldsfasta verður tryggjað ein rímilig minstapensjón.

Tað er at fegnast um, at vælferðin aftur er komin á politisku dagskránna, og ásannast má, at hetta er í tøkum tíma. Eftir at vit nú í seks ár hava havt eitt týðandi om mangan fruktagott orðaskifti um ríkisrættarligu støðu Føroya, eiga vit at taka upp táttin at menna vælferðina hjá vanligum fólk, hjá pensionistum og einsamøllum uppihaldarum. Vónandi fara allir flokkar at taka væl ímóti hesari útmelding og vónandi fara ítøkilig úrslit at spyrjast burtur úr hesum góðu ætlanum.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# De nye offentlige ansatte

**Nina Dahl**

Sad i et møde, da de begyndte at snakke om den nye gruppe af offentlige ansatte: de forhenværende timelønnede. Hvad lignede det, at de kunne være hjemme hos syge børn med fuld løn, mens de timelønnede på filetfabrikkerne ikke kunne? – Nu var det ikke det, mødet drejede sig om – så jeg kommenterede det ikke – det vil jeg gøre her.

Når krisen kradser, og der mangler penge i budgettet, er det som oftest den billige arbejdskraft, den først rammer. De ufaglærte er en sådan gruppe – det er en bitter erfaring - . Det var den erfaring, der fik Havnar Arbeiðskvinnufelag til i 2001 at indgå en overenskomst for ufaglært timelønnet personale i det offentlige, rengøringsfolk, vaskeriarbejdere og køkkenhjælpere. – Fra at være timelønnede blev de fast ansat og fik nogle af de samme rettigheder som andre offentligt ansatte, bl. a. 3 måneders opsigelse efter 2 år og at kunne være hjemme ved børns første sygedag 10 dage i alt pr. År. 20 dage, hvis der er mere end tre børn under 10 år.

Det lyder roserødt, men alt har sin pris. Før 2001 fik de timelønnede i det offentlige samme %-satser for merarbejde som i den private overenskomst, 65% i lørdagstillæg, 100 % i søndagstillæg – mange arbejdede i faste weekendvakter, hvis man kan tale om timelønnede og faste vakter – det faldt altsammen væk og blev i stedet erstattet af faste tillæg, der var langt mindre, og afspadsering for søn og helligdagstimer– for nogen var det en løntilbagegang. Til gengæld fik alle del i nogen sosiale goder, som hidtil kun havde været for funktionærgruppen.

Der var ingen champagnepropper, der sprang, da overenskomsten blev underskrevet, og mange mente vel, at dem, der underskrev den, ikke var helt velforvarede.

Mange har vel haft deres del i den, men havde forkvinden i Havnar Arbeiðskvinnufelag, Vígdis Johannesen, ikke sat alt ind, også sin egen stilling som forkvinde, var den overenskomst aldrig kommet i hus. Da overenskomsten blev underskrevet, var økonomien god, og der var arbejde til næsten alle, men hun vidste af bitter erfaring, fra sit daglige arbejde, at næste gang økonomien var i en bølgedal, ville de første, der fik en fyreseddel, være de timelønnede. Man bliver nødt til at se tingene i et langtidsperpektiv. Det er altså forklaringen på, hvorfor de ufaglærte offentlige ansatte kan være hjemme hos syge børn i modsætning til de ufaglærte på det private arbejdsmarked – men der er altså betalt!!!

# Heimarøktin – ein spurningur til Hans Paula Strøm, landsstýrismann

**Súni í Hjøllum**
*bygdaráðslimur í Nes kommunu*



Av og á verður tú sum bygdaráðslimur spurdur av borgarum um mál, sum tú als onga ávirkan hevur á. Í hesum føri eri eg spurdur um eitt mál av einum hjúnum, sum eru komin upp um tey 80 árini. Málið snýr seg um heimarøktina.

Í skrivi dagfest 18. juni skrivar økisleiðarin til teirra: ***"Vegna nógv økta arbeiðsbyrðu, serliga nú í summar, umframt at starvsfólkini hjá okkum fara í summarfrí, mugu vit tíverri siga frá, at vit ikki verða før fyri at veita tygum reingerð í juli og august mánaða í ár."***

Halda tygum, at hendan tænastan er nøktandi?

Eisini loyvi eg mær at spyrja, um tað er rætt skilt, at eldrasambýlini eru so undirmannaði við starvsfólki nú, at neyðugt er at biðja tey avvarðandi hjálpa til?

**Innsent tilfar**

Av tí at vit fáa rættuliga nógv innsent tilfar sendandi – meira enn vit fáa í blaðið – hevur blaðleiðslan verið noydd at gjørt nakrar avmarkingar.

Enn sum áður skal fult navn skal vera undir øllum innsendum greinum – annars verða tær ikki prentaðar. Harnæst tilskila vit okkum rætt til at ikki at taka við tilfar, sum eisini er sent øðrum bløðum ella hevur verið prentað aðrastaðni.

Drúgvar greinar – greinar sum eru longri enn áleið 5.500 tekn, verða raðfestar lægri, og koma bert í blaðið, um pláss er fyri teimum. Tað er ein fyrimunur um vit fáa tilfarið umvegis teldupost ella á diskli.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Konsert á Bryggjuni

*Tá poppurin úr Liverpool tók land á fyrsta sinni*
*sótu vit á trappuni hjá Lenu meir og minni*
*ímillum belj og hundagoyggj vit hoyrdu nýggja ljóðið*
*sum haraftrat varð álað sundur av transistorskróvi*

"Á Trappuni hjá Lenu", Sámal Ravnsfjall frá Váð(g)averk.



Tá Týr koma fram at sum teir seinastu megnaði hesin hartspælandi bólkurin tó at spæla gjøgnum allan salin

**Føroyskir útisetar í øllum aldri vóru farnir á konsert á Bryggjuni á Ólavsøku. Fyrireikararnir høvdu fingið kendar sangarar og bólkar úr Føroyum at spæla í glæsiligu hølunum á Bryggjuni. Hetta kvøldið spældu nøvn sum Hanus G. Johansen, Týr, Sámal Ravnsfjall, Stanley Samuelsen og onnur**



*Hanus G. Johansen kenna øll sum ein fínan tolkara av Poul F. Joensen, Hans Andreas Djurhuus, Richard Long, T. N. Djurhuus, Bernhard Brim. Hetta kvøldið sang hann eisini onkra yrking eftir Omar Khajjam, ið doyði í 1122*

KONSERT
*Kim Simonsen*

Rættuliga nógv fólk var samankomið hetta kvøldið. Millum føroyingarnar hetta kvøldið vóru kanska flest eldri útisetar. Tey ungu lesandi eru mest í Føroyum um hetta mundið. Útisetarnir í Keypmannahavn hava teirra egna útisetasamfelag. Sjálvandi halda føroyingar uttanlands eisini ólavsøku. Til ólavsøkuna hoyrir eisini tónleikurin til slíkt veitslulag. Nøvn sum Hanus G. Johansen og Sámal Ravnsfjall skaptu rætta veitsludámin hetta kvøldið. Týr settu lív í at enda, sjálvt um hetta er eitt vánaligt orkestur. Hesir mennirnir eru nærum óviljaðir skemtiligir.

Tað var eitt sindur spell at fara innandura hetta kvøldið. Vit sótu á stóru caféini Luftkastellet, ið er granni at Bryggjuni. Har var óført av fólki komið saman. Hetta er kanska ein av teim smartastu caféunum í Danmark, ið bert liggur eitt fótafet frá Bryggjuni, men á Bryggjuni var tómligt uttanfyri. Tað kemur at taka eitt stórt arbeiði hjá hesum stað at kappast við øll tey hundravís av tilboðum í Keypmannahavn. Hesin býurin, ið herfyri bæði varð valdur sum ein hin dyrasti býurin í heiminum, men eisini ein av teim liviligastu. Veðrið var av tí fagrasta, sum yrkjarin tók til :

*"og kenni regnið og hoyra*
*stormin*
*og havið duna*
*og verða burtur í*
*summarsælu*
*og vætubruna"*

Ricard Long

Uttan fyri vóru telt, á Molanum hevði matstovan Noma sett borð kring listaverkið hjá Tróndi Patursson. Í mun til Luftkasstellet var tómligt á Noma. Hetta kvøldið var heldur løgi at traðka inn í eitt føroyskt hátíðarhald. Sjálvum hevði mær dámt nógv betur at kunna sitið uttandura, men so høvdu fyrireikararnir ikki kunna fingið peningin aftur fyri stóra og dýra tiltakið. Veðrið í ár hevur heldur ikki verið so gott. Tá fleiri hundrað fólk koma saman í einum stórum veitsluhøll gerst heitt og slavið. Eg haldi ikki, at hetta hølið var so vælegnað sum konsertstað. Ein helvt av salinum hoyrdi tónleikin, meðan hin helvtin drakk øl, prátaði og hugnaði sær. Sum so minti hetta tiltakið um eitt meiri óformelt cafékvøld í Føroyahúsinum. Eg havi verið til konsert fyrr á Bryggjuni bæði við Teiti og Enekk, ið riggaðu nógv betri og vóru eisini heldur stuttari. Kanska programmið var ov stórt. Fólk hava hug at heilsa upp á kenningar og vinir eitt slíkt kvøld, ið skapar ein róm, ið ikki riggar við stillar og inniligar sangarar sum Hanus G. Johansen og Sámal Ravnsfjall. Tá Týr koma fram at sum teir seinastu megnaði hesin hartspælandi bólkurin tó at spæla gjøgnum allan salin.

Við at seta so nógv ymisk nøvn á skránna høvdu fyrireikarnir roynt at geva bæði yngri og eldri hvat tey vilja hava, men tað er enn ein stórur munur á Stanley Samulsen og Týr. Hetta er sum at seta Sunnleif Rasmussen og 200 at spæla sama kvøld. Annars spældu Bo Liengård og Petersen-Olsen-Lawaetz trio eisini.

### Fólksangur á høgum støði

*"Eg leit í tíni eygu -*
*og skelvandi eg sá:*
*øll heimsins dýrd og tregi*
*í dýpi teirra trá"*

Richard Long

Tað var ikki minni enn eitt bragd, Hanus G. Johansen gjørdi, tá hann fór undir at tulka yrkingarnar hjá hargarskaldinum.

### Hanus G. Johansen

Hanus G. Johansen kenna øll sum ein fínan tolkara av Poul F. Joensen, Hans Andreas Djurhuus, Richard Long, T. N. Djurhuus, Bernhard Brim. Hetta kvøldið sang hann eisini onkra yrking eftir Omar Khajjam, ið doyði í 1122. Hanus upptraðkar við einum serligum hugtakandi eymleika, ið skapar eina smittandi lívsgleði. Hann velur mangan beiskar og sorgarbundnar vísur, men sangurin er júst merktur av einum serligum pathos, ið ger at hann er rørandi. Hanus torir at siga okkum okkurt og ger tað fegin.

### Váð(g)averk

*"Bygdin her hjá okkum hon*
*er full av originalum*
*inn millum sløðist onkur*
*hendinga normalur (...)*

S. Ravnsfjall

Vágamaðurin Sámal Ravnsfjall hevur eitt serligt sound, ið kann verða torført at skilja. Tað er sum um eg hómi eitt ekkó av øllum frá Bob Dylan, Neal Young og Tinganest. Her er bæði fólkatónleikur og serligir dansitónar vit mangan hoyra í Føroyum. Hann dugir væl at standa á einum palli. Tekstirnir hjá honum eru mangan stuttligir og absurdir. Teir bestu eru teir, hann sjálvur hevur skrivð sum "Á trappuni hjá Lenu" og "Eftir bygdagøtum". Hvør bygdadrongur skilir ikki:

*"Ja…67 var herviligt hjá*
*okkum bygdasviskum*
*tá roykurin frá pípunum*
*hekk yvir San Francisco*
*tað kendist nokkso undarligt tað mugu vit væl siga*
*at vera til ein happening*
*í neystinum hjá Dia"*

Í sanginum endar høvundin við niðurstøðuni, at tey á bygd, ella í Føroyum: "sita jú enn á trappuni hjá Lenu meir og minni". Sámal hevur sjálvur ferðast víða um heimin og hevur sæð annað enn trappuna hjá Lenu. Hetta er eisini ein tanki, ið mangan stingur seg upp, tá eg vitji aftur í Føroyum, at alt á ein hátt er sum tað var í 1975, ella í 1981. Men millum tey yngru eru góð nøvn komin fram sum Teitur, Eivør, Gestir og Enekk. Føroyar er í eini broytingartíð millum trappuna hjá Lenu og stórbýarlív í Keypmannahavn. Vónandi gloyma vit ikki trappuna hjá Lenu, tí tað er har tey flestu av okkum byrjaðu.

### Hvíldarløta

Tað er mangan nakað serligt fyri ein útiseta at koma saman við føroyingum. Har sær man kend andlit og minni kend. Gjørligt er at drekka føroyskar øl. Haldi at Black Sheep er ein heilt góð øl, ið langt frá smæðist burtur millum aðrar góðar øl. Jú hatta var ein góð ólavsøka í Keypmannahavn.



*Nógv fólk vóru á konsertini í Bryggjuni á ólavsøku*